

# Meistaradetektivurin

Tað er neyvan nakar fiktivur persónur, sum á sama hátt sum Sherlock Holmes, hevur fingið eina veruleikakenda tilveru, har tað fyri uttanfyristandandi kann vera trupult at skilja ímillum, hvørt talan var um veruleika ella beran heilaspuna burtur úr væl hugsandi heilanum hjá Sir Arthur Conan Doyle, ið jú var maðurin aftan fyri heimskenda detektivin.

Sjálvandi er tað hetta seinna, sum er galdandi, men tað skerst ikki burtur, at mytan um Sherlock Holmes framvegis livir sítt egna lív. Somikið væl livir hon, at fer lesarin ein gongutúr eftir Baker Street í London, so ber til at steðga á við íbúð nummar 221B, har Sherlock Holmes jú var búsitandi sambært høvundanum, og eisini er hann at finna millum kendu andlitini i vokskabinettinum hjá Madame Tussaud. Og verður leita í bókemtum av ymsum slag, so ber uttan stórvegis hóvaták at seta eina biografi saman um persónin.

Eftir øllum at døma, so varð Sherlock Holmes borin í heim tann 6. januar í 1854, og er hann soleiðis júst vorðin 150 ára gamal. Eitt høvi, sum Viasat-rásin nú nýtir til at senda eina røð av filmum við kenda bretanum. Eitt nú eru hundurin í Baskerville, Kvinnan í grønum, Terror by Night og Dressed to Kill millum filmarnar, sum í næstum koma á skíggjan, og har Holmes og vælkendi hjálparmaður hansara, Dr. Watson, síggja loysnir, sum eingin annar hevði megnað at funnið.

Fyrstu ferð, tað bar til at lesa um brøgd hansara, var í 1891, tá Strand Magazine prentaði eina røð av søgum um hann, og í árunum, 1881-1904 var hann maðurin, sum uppkláraði hópin av málum.

Høgi og klæni maðurin við dimma hárinum, gráu eygunum og heyka-líknandi nøsini var altíð í góðari venjing, og um tað so snúi seg um bardagar í eysturlendskum stíli, so var hann eisini maður fyri at klára hetta. Tað er tó ikki alt í hansara livimáta, sum samsvarar við nútíðar idealini fyri slíkt.

Eitt nú er hann trúfastur roykjari, og pípa hansara er ongan tíð langt burturi, og eisini dámar honum væl at fáa sær eina innspræning við kokain. Ein óvani, sum Watson til fánýtis hevur roynt at fingið hann burtur frá. At hetta ikki lat seg gera, er tó eisini ein undirstrikan av, hvussu stóran dent Holmes altíð legði á alkymi'ina. Eitt kynstur, sum hann var sannur meistari í, og sum ofta var honum ein stór hjálp í royndunum at uppklára mál

Tá hann ikki stríðist við at uppklára brotsverk av ymsum slag, dámar honum sera væl at slappa av við eitt sindur av tonleiki, og í nógvar mátar tykist hann liva eitt sera friðsælt lív, har eitt av stóru frítíðarítrivunum sjálvsagt er at fara til konsertir, og serliga er tað týskur violin-tónleikur, sum hevur hansara stóra alsk.

Hinvegin er ikki alt so lætt hjá honum. Hóast tað ikki er ein lagna, sum hann hevur valt sjálvur, so er hann gamal drongur, men oftani droymir hann tó um Irenu Adler, sum var hansara einasta eina.

Evni hansara at uppklára brotsverk hava eyðvitað eisini gjørt, at hann millum ár og dag hevur fingið sær hópin av fíggindum. Millum teir mest vandamiklu teljast støddfrøðingurin, James Moriarty, men eftir ein bardaga við Reichenbach fossin í Sveis eydnaðist tó Holmes at sleppa heiminum undan hesum bølmenni. Deyðin fangaði eisini tveir aðrar av stóru fíggindunum. Charles Augustus Milverton var sambært Holmes ljótasti maðurin í London, men hann mátti at enda geva skarvin yvir, tá hann varð skotin av eini kvinnu, sum hann hevði kroyst ov hart, og Sir Grimesby Roylott, sum oftani var eftir Holmes, varð at enda sjálvur offur fyri slangunum, sum hann ætlaði skuldu taka lívið av Holmes.

Hóast hann gavst við arbeiði sínum í 1904, so var Holmes einstakar ferðir aftur at síggja. Í 1907 hjálpti hann til, tá morðið á Fitzroy McPherson skuldi uppklárast, og í 1912 játtaði hann bretska uttanríkisráðharranum at hjálpa til at seta eina njósnaradeild á stovn. Í hesum sambandi var hann í august mánaði í 1914 í Chicago, men síðani hann kom aftur frá hesi ferðini, hevur eingin hoyrt nakað til Sherlock Holmes.



